Fylgiskjal 6

**Nella Festirstein**

| | |
|---|---|
| **Fra:** | dat@dat.fo |
| **Sendt:** | 21. maj 2019 11:24 |
| **Til:** | Nella Festirstein |
| **Emne:** | SV: TIL UMMÆLIS: Ríkislógarmæli um at seta Politilógina í gildi fyri Føroyar. Freist 27. mai. |
| **Opfølgningsflag:** | Opfølgning |
| **Flagstatus:** | Afmærket |

Góða Nella.

Løgreglan er, sum kunnugt danskt málsøkið, og er tískil ikki fevnd av føroyskari men av danskari persónsupplýsingarlóggávu.
Tað er persónsupplýsingarlógin, sum ikki longur er í gildi í Danmark, sum er galdandi fyri løgregluna í Føroyum, og tað er danska Dátueftirlitið sum hevur eftirlitið við, at tann viðgerð av persónsupplýsingum, sum løgreglan í Føroyum ger, er lóglig og røtt. Í hvønn mun danska Dátueftirlitið hevur framt ella fremur hetta eftirlit við løgregluni í Føroyum er ikki upplýst í tilfarinum.

Dátueftirlitið skal tó, vísandi til ásetingina í kap. 2 í lógaruppskotinum, vísa á, at fyrr enn ein kunngerð er gjørd við heimild í § 2, 3. stykki í lógaruppskotinum, ber ikki til hjá Dátueftirlitinum at gera viðkomandi viðmerkingar um ta viðgerð av persónsupplýsingum, sum løgreglan ger, eins og ikki ber til neyvt at meta um, hvørjar persónsupplýsingar sipað verður til í § 2 ( "nødvendigt af hensyn til.....").
Men talan er óivað um stóra mongd av persónsupplýsingum heruppií eisini um viðkvæmar persónsupplýsingar s.s. revsiverd viðurskifti og heilsuupplýsingar. Tískil er tørvurin á, at viðgerðin væl og virðiliga fer fram í tráð við persónsupplýsingarlógina, har aðalregaln jú er, at tess fleiri persónsupplýsingar ein dátuábyrgdari viðgerð og tess størri mongdin av viðkvomum persónsupplýsingum er, sum verður viðgjørd, tess tryggari skal heimildargrundarlagið og mannagongdirnar fyri viðgerðini vera.

Tískil er sera umráðandi, at bæði kunngerðin og mannagongdir fyri viðgerð av persónsupplýsingum verður gjørd.

§ 2,3. stykki hevur nærri ásetingar um, hvat kunngerðin skal fevna um, og Dátueftirlitið kann bara viðmerkja, at tað er av alstórum týdningi, at bæði kunngerð og mannagongdir fyri viðgerð av persónsuppplýsingum verða gjørdar og settar í verk samstundis sum lógin, tí aðramáta ber ikki til at tryggja, at tann atgongd til viðgerð av persónsupplýsingum, sum løgreglan fær, verða viðgjørdar sambært persónsupplýsingarlógini.

Allar royndir vísa, at lóglig viðgerð av persónsupplýsingum, kemur ikki av sær sjálvum, men at tann einstaki dátuábyrgarin, her løgreglan/løgmálaráðið, tvørturímóti má gera eitt miðvíst arbeiði til tess at implementera mannagongdir fyri lógligari viðgerð á stovninum, í hesum føri á løgreglustøðini í Føroyum.

Samanumtikið skal Dátueftirlitið tí staðiliga heita á landsstýrið um at fylgja hesum lógaruppskoti upp við at fylgja málinum, soleiðis at umrødda kunngerð og mannagongdir við støði í galdandi persónsupplýsingarrætti verður gjørd skjótast tilber.
Í aðramáta ber ikki til at tryggja skrásetta, (sum er, tann, hvørs persónsupplýsingar løgreglan viðgerð, vanliga ein føroyingur), at tann viðgerðin av persónsupplýsingum, sum løgreglan í Føroyum ger, fer fram eftir galdandi persónsupplýsingarlóg og trygdarkunngerð(sikkerhedsbekendtgørelse).

Vinarliga

Eyðhild Skaalum